Frá Sunda kommunu

# Pedagogar

## til barnagarðin við Kráir í Hvalvík

Søkt verður eftir pedagogum til barnagarðin og vøggustovuna, at byrja 15. august 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Størvini at søkja er:**
2 pedagogar til barnagarðin 35 t/v.
1 pedagogur til vøggustovuna 35 t.v.

Barnagarðurin er skipaður við 3 barnagarðsstovum, 1 vøggustovu og frítíðarskúla.
Barnagarðurin liggur í hugnaligum, barnavinarligum umhvørvi heilt oman til tað vælkendu stóru ánna, sum er ein natúrligur partur av okkara gerandisdegi.

**Vit ynskja:**
- At tú hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu
- At tú hevur hug til at skapa og seta dám á okkara barnagarð.
- At tú hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um eingin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Nancy Poulsen, leiðara, á tlf. 772021 ella 422717.

Umsóknir við avritum av prógvi verða at senda til:

**Barnagarðin við kráir**
FO-430 Hvalvík

Umsóknarfreistin er í seinasta lagi tann 12. juni 2006.

Endurlýsing

# Stuðulspedagogur

## til Frítíðarskúlan í Trongisvági

Søkt verður eftir einum stuðulspedagogi til Frítíðarskúlan í Trongisvági at byrja 14. august 2006 ella eftir nærri avtalu.

Setanin er sambært broytingum í § 5 í Dagstovnalógini, sum kommunurnar nú partvís skulu umsita. Starvið er uttanum tað vanligu normeringina og verður arbeiðstíðin 25 tímar um vikuna.

Arbeiðið hjá pedagoginum verður m.a. at stuðla 2 børnum á 7 og 8 ára aldri, serstakliga við atliti til ta sosialu menningina.

**Starvið er tíðaravmarkað til 22. juni 2007.**

**Vit vænta av tær:**
- At tú tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- At tú vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfelagnum
- At tú ert nærløgd/lagdur og vísir umsorgan
- At tú ert tolin og hevur áhuga í at menna børnini
- At tú hevur góð samstarvsevnir viðv. starvsfólk, foreldur og aðrar fakbólkar.

**Stovnslýsing:**
Frítíðarskúlin er normeraður til 24 børn í 1. og møguliga 2. og 3. flokki. Hildið verður til í høli hjá Trongisvágs skúla.

**Lønarviðurskiftir:**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Siri Mortensen, virkandi leiðara, á tlf. 372750 ella 225894.

**Umsókn:**
Saman við upplýsingunum, royndum og møguligum viðmælum skulu vera

**Frítíðarskúlanum**
FO-826 Trongisvágur

í hendi í seinasta lagi 2. juni 2006.

Frá Sunda kommunu

# Størv

## í Norðskála-Oyrar skúla

**Vegna farloyvi, lækkað tímatal og næmingar við serligum tørvi, verða hesi tíðaravmarkaðu lærarastørv lýst leys at søkja.**

- 2 fulltíðarstørv
- 1 parttíðarstarv

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstravi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Harumframt skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum/lærugreinaøkjum:**
- Flokslærarauppgávan
- Undirvísa dreingjum í ítrótti og í svimjing
- Undirvísa í rokning/støddfrøði
- Undirvísa í lesing í innskúlingini
- Undirvísa í handaligum lærugreinum

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum. Tó kunnu lærarlesandi, ið lúka prógv í summar eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir:**
Setanarøki er Norðskála-Oyrar skúli. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1-27.4 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið. Størvini verða sett sum tíðaravmarkað størv fyri skúlaárið 2006/2007.

**Stuðul**
Søkt verður eisini eftir stuðli 20 t/v til næmingar við serligum tørvi til tíðaravmarkað starv 1. august 2006 til 30. juni 2007.

Løn sambært avsáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við c. v. og avriti av prógvum skulu vera 1. læraranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin **2. juni 2006 kl. 12.00.**

Fleiri upplýsingar um størvini fært tú við at ringja til 1. læraran á 771035 ella við at senda teldupost til oli.jakup.joensen@skulin.fo

Norðskála-Oyrar skuli er 4. flokkaður skúli. Komandi skúlaár verða umleið 63 næmingar og um 6 lærarar og 1 stuðul.
Tú kenst lesa meir um okkum á heimasíðuni www.sunda.fo - fylg slóðini skúlar.

Norðskála-Oyrar skúli er kendur fyri at vera næmingavinarligur skúli. Komandi ár fara vit serliga at arbeiða við eftirmeting og trivnaði. Vit eru til reiðar til framtíðina… alla tíðina.

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við